# Sáttmáli
# Millum

# Akademikarafelag Føroya
# og
# Fíggjarmálaráðið

# 2022 til 2025

# Innihald


1. Kapittul ..... 4

**§ 1. Sáttmálaøki** ..... 4

2. Kapittul ..... 4

**§ 2. Setan** ..... 4

**§ 3. Setanarbræv** ..... 4

**§ 4. Løn** ..... 5

**§ 5. Farloyvi** ..... 5

**§ 6. Eftirløn** ..... 5

**§ 7. Barnferð** ..... 5

**§ 8. Sjúka** ..... 6

**§ 9. Eftirsitiløn** ..... 6

**§ 10. Uppsøgn** ..... 6

**§ 11. Frítíð** ..... 6

**§ 12. Fastir frídagar og serstaka frívikan** ..... 6

**§ 13. Fyribilstænasta í hægri starvi** ..... 7

**§ 14. Yrkisfelagsarbeiði** ..... 7

**§ 15. Samstarvsráð** ..... 7

**§ 16. Førleikameting** ..... 7

3. Kapittul ..... 8

**§ 17. Barnsburður, ættleiðing og sjúka** ..... 8

**§ 18. Aðrar setanartreytir** ..... 8

**§ 19. Uppsøgn** ..... 8

4. Kapittul ..... 9

**§ 20. Arbeiðstíð** ..... 9

**§ 21. Løn o.a.** ..... 9

**§ 22. Serflokking og viðbøtur** ..... 9

**§ 23. Tímaløn** ..... 10

**§ 24. Tímalønir á Fróðskaparsetrinum** ..... 10

**§ 25. Yvirtíðararbeiði** ..... 11

**§ 26. Starvs- og lønaraldur** ..... 11

**§ 27. Frí við ongari løn** ..... 11

**§ 28. Sjálvboðið eyka arbeiði** ..... 11

**§ 29. Tænastuferðir** ..... 11

**§ 30. Førleikamenning** ..... 12

**§ 31. Flytisamsýning** ..... 12

5. Kapittul .......... 12
**§ 32. Seravtalur** .......... 12
**§ 33. Gildiskoma og uppsøgn** .......... 12

# 1. Kapittul

**Kapittulin er um sáttmálaøkið og viðgerð av ósemjum**

## § 1. Sáttmálaøki

Sáttmálin er fyri størv, har tað er ein fyritreyt fyri setan, at tann setti hevur útbúgving sum verkfrøðingur, arkitektur, byggifrøðingur,magistari ella sálarfrøðingur (cand.psyk).

Deildarstjórar, ið hava útbúgving sum hoyrir undir sáttmálaøkið hjá AKF, eru somuleiðis fevndir av sáttmálanum, undantikið §§ 4 og 14 – 28.

*Stk. 2.* Er sáttmálin uppsagdur, og semja ikki kemur í lag partanna millum, ella annar parturin ber seg undan tingingum, hevur hvør av pørtunum rætt til at fáa tingingarnar framdar við at semingsmaður leggur uppí. Sí ll. nr. 39 frá 13. mai 2013 um semingsstovn.
*Stk. 3.* Ivaspurningar um at tulka sáttmálan verða at leggja fyri Fasta Gerðarætt.

*Stk. 4.* Sáttmálin er ikki fyri tænastumenn, tænastumenn sum fáa bíðipening ella tænastumenn við eftirløn.

# 2. Kapittul

**Kapittulin er um setanarviðurskifti hjá starvsfólki, sum er sett í starv í 3 mánaðir ella longur. Talan er um fast ella tíðaravmarkað starv.**

## § 2. Setan

Leys størv, sum sett skulu verða eftir hesum sáttmála, skulu verða lýst leys alment. Tilskilað skal verða, hvat starvið fatar um, hvør útbúgving og førleiki krevst og hvør lønin er.

*Stk. 2.* Er talan um tíðaravmarkaða starvssetan, skal lýsingin siga neyvt frá um hesi viðurskifti. Ikki er neyðugt at lýsa størv leyst, um starvstíðin er styttri enn 6 mánaðir.

## § 3. Setanarbræv

Í seinasta lagi 14 dagar eftir setanina fær starvsfólkið setanarbræv. Í setanarbrævinum skal standa:

- navn og bústaður hjá setanarmyndugleikanum og tí setta,
- nær setanin tekur við, og um setanin er tíðaravmarkað, nær hon so endar,
- galdandi sáttmáli millum omanfyri nevndu partar at ganga eftir,
- starvsheiti,
- byrjanarløn (grundløn og førleikaløn),
- eftirlønargjald,
- starvsaldur og næstu broytingar í starvsaldri,
- uppsagnartíð frá arbeiðsgevara og setta,
- setanarbrotpartur, arbeiðstíð
- frítíð við løn og frítíðarískoyti,
- setanarøki og
- arbeiðsstaður/staðir í løtuni (fatar arbeiðið um fleiri arbeiðsstaðir, skal verða viðmerkt á hvørjum arbeiðsstaði umsøkjarin hevur høvuðsstarv).

## § 4. Løn

Størvini verða flokkað og lønt sum ásett í kapittul 4.

*Stk. 2.* Lønin verður eftir setanarbrotparti og starvsaldri, sum eftir § 3 verður tilskilað í setanarbrævinum.

*Stk. 3.* Lønin verður goldin mánaðarliga afturút og í seinasta lagi síðsta dag í mánaðinum, sum peningastovnarnir hava opið.

## § 5. Farloyvi

Starvsfólk kann fáa farloyvi við ongari løn, tá ið tað ikki gongur ímóti áhugamálunum hjá stovninum. Um so er, at starvsfólk fær farloyvi til útbúgving, ella eftirútbúgving, kann tað fáa frí við løn ella niðursettari løn. Farloyvi kann verða givið í upp í 2 ár hvørja ferð, tó í mesta lagi í 4 ár, og hevur stovnurin skyldu til at hava starv til starvsfólkið, tá ið farloyvið er av. Starvsfólk, sum hevur starvast longur enn 5 ár, skal alt tað ber til altíð hava rætt til minst 1 árs farloyvi.

*Stk. 2.* Felagið kann fáa farloyvi til nevndarlimir í upp til eitt ár í senn við at boða stovninum frá, og gjalda sín lutfalsliga part av lønini.

## § 6. Eftirløn

Eftirlønargjaldið er 16 % av grundlønini og førleikalønini. Hetta tó við undantaki av viðbótum sambært § 22 stk. 1 og 2.

*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjaldið í góðkenda eftirlønarskipan.

*Stk. 3.* Eftirlønargjaldið verður flutt samstundis, sum lønin verður útgoldin.

## § 7. Barnferð

Starvsfólk, ið er við barn, eigur at siga stovninum frá í minsta lagi 3 mánaðir fyri metta føðing.

*Stk. 2.* Starvskvinna, ið er við barn, hevur rætt til barsilsfarloyvi av viðgongu og barnsburði. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, kann starvskvinna fara úr arbeiði við løn fram til føðing. Eftir føðing fær starvskvinna farloyvi við løn í 24 vikur. Barsilsfarloyvið við løn kann soleiðis verða bæði styttri og longri enn 28 vikur tilsamans, men eftir føðing eru altíð 24 vikur við løn.

*Stk. 3.* Prógvar starvsfólkið við læknaváttan, at hon er óarbeiðsfør 4 vikur ella fyrr undan mettari føðing, verður hetta roknað sum vanlig sjúka, og starvsfólkið hevur tá rætt til løn undir sjúku. Tá ið 4 vikur eru eftir til metta føðing, verður farið frá løn undir sjúku til barsilsfarloyvi við løn, sbr. stk. 2.

*Stk. 4.* Umframt nevndu sømdir kann starvsfólk fáa farloyvi við løn alla viðgongutíðina, um hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum.

*Stk. 5.* Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Frá 1. oktober 2024 kunnu hesar 10 vikurnar við løn liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið eftir viku 14.

*Stk. 6.* Starvsfólk, ið ættleiða barn, hava rætt til fráveru við løn í upp til 4 vikur áðrenn, tey fáa barnið, og í 24 vikur tilsamans. Foreldrini kunnu býta rættin til fráveru við løn ímillum sín. Rætturin til fráveru við løn er treytaður av, at ættleiðingarmyndugleikin frammanundan hevur gjørt av, at foreldrini, annað ella bæði, skulu vera heima í samband við, at tey fáa barnið. Foreldrini kunnu ikki vera í farloyvi við løn samstundis eftir hesi grein.

*Stk. 7.* Umframt farloyvi nevnt í stk. 2-6, hava starvsfólk rætt til farloyvi við ongari løn og uttan at missa starvsaldur soleiðis, at samlaða farloyvistíðarskeiðið tilsamans er 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið. Tíðarskeiðini eru samanhangandi, og farloyvi eftir hesi grein skal vera avgreitt í seinasta lagi 52 vikur eftir føðing ella eftir, at tey hava fingið barnið.

## § 8. Sjúka

Fyri sjúku galda ásetingarnar í starvsmannalógini.

*Stk. 2.* Starvsfólk kann fáa frí við løn, tá ið barn/børn tess er/eru sjúk, tó í mesta lagi í 2 dagar hvørja ferð og í mesta lagi tilsamans 10 dagar um árið. Eigur tað fleiri enn 2 børn undir 10 ár, kann tað fáa frí upp í 20 dagar um árið.

## § 9. Eftirsitiløn

Tá ið starvsfólk doyr í tænastutíðini, eiga hjúnafelagi/samlivari ella børn undir 21 ár, sum tað uppiheldur, rætt til løn samsvarandi uppsagnartíðini, minst 3 mánaðir, tó hægst 6 mánaðir. Eftirsitilønin er seinast útgoldna mánaðarlønin. Lønin í mánaðinum, tá ið starvsfólkið doyr, verður ikki roknað upp í eftirsitilønina.

## § 10. Uppsøgn

Verður starvsfólk sagt úr starvi, galda ásetingarnar um uppsøgn í løgtingslóg um starvsmenn, og uppsagnartilgongdin verður handfarin sambært galdandi fyrisitingarligum reglum.

Sama dag, sum hoyringarskriv verður handað starvsfólki, skal arbeiðsgevarin senda AKF fráboðan um, at hoyringarskriv er handað.

## § 11. Frítíð

Frítíð er eftir løgtingslóg nr. 30 frá 7. Apríl 1986 um frítíð við løn við seinni broytingum.

## § 12. Fastir frídagar og serstaka frívikan

Jólaaftan, nýggjársaftan, páskaaftan, flaggdagur, hvítusunnuaftan, ½ grundlógardagur, ½ ólavsøkuaftan, ólavsøkudagur umframt allir halgidagar eru frídagar.
*Stk. 2.* Starvsfólk hava harumframt rætt til serstakar frídagar eftir avtaluni um serstaka fríviku.

## § 13. Fyribilstænasta í hægri starvi

Starvsfólk, sum eftir serligum boðum ella eftir frammanundan fastløgdum arbeiðslagi við góðkenning fyribils røkir hægri starv í 1 viku samfelt ella meira, eigur í hesum tíðarskeiði at fáa somu løn, sum tað hevði fingið, varð tað sett í starvið, treytað av, at tað yvirtekur tær arbeiðsuppgávur, ið standast av hægra starvinum.

## § 14. Yrkisfelagsarbeiði

Álitisfólk og nevndarlimir kunnu ikki verða uppsøgd, uttan at uppsøgnin hevur verið til viðgerðar millum Fíggjarmálaráðið og felagið.

*Stk. 2.* Tann, sum verður vald/ur til formann í felagnum, hevur altíð rætt til at fáa farloyvi uttan løn, og hevur stovnurin skyldu at hava starv til viðkomandi, tá ið formansskeiðið er lokið. Sí eisini § 5 stk. 2.

*Stk. 3.* Umsókn frá starvsfólki, álitisfólki ella nevndarlimi um at sleppa á fakfelagsskeið verður viðgjørd við vælvild.

*Stk. 4.* Uppsagnarfreistin hjá álitisfólkum verður longd við 3 mánaðum.

*Stk. 5.* Er starvsfólk valt í nevnd felagsins, skal tí verða givin heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í givnum førum, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum og arbeiðsósemju.

## § 15. Samstarvsráð

Á øllum almennum stovnum verður sett á stovn eitt samstarvsráð, har umboð fyri leiðslu, álitisfólk og varaálitisfólk sita. Samstarvsráðið skal hava innlit í øll mál stovninum viðvíkjandi, og verða avgerðir ikki tiknar, fyrr enn samstarvsráðið hevur gjørt sítt tilmæli.

*Stk. 2.* Settur verður 4 manna bólkur við 2 limum valdum av yrkisfeløgunum og 2 limum valdum av landsstýrinum at gera uppskot til reglugerð fyri virkið hjá samstarvsráðnum.

## § 16. Førleikameting

Starvsfólk, sett eftir hesum sáttmála, hevur rætt at fáa sín frøðiliga førleika mettan, um hetta hevur týdning fyri starvið hjá viðkomandi.

*Stk. 2.* Førleikakrøvini verða tey somu, sum galdandi eru á Fróðskaparsetri Føroya. Um viðkomandi hevur veitt vísindaliga ráðgeving, eigur hendan at verða tikin við í metingina.

*Stk. 3.* Í hvørjum einstøkum føri verður skikkað uttanhýsis metingarnevnd sett at gera tilmæli, um viðkomandi lýkur treytirnar samsvarandi frøðiliga førleikanum á 1., 2. Ella 3. Stigi – eisini kallað adjunkt-, lektara- og professaraførleiki. Felagið skal hava tilnevningina av metingarnevndini til ummælis 2 vikur áðrenn, nevndin verður tilnevnd.

*Stk. 4.* Stovnsleiðslan setur metingarnevndina, og stovnurin ber útreiðslurnar av metingini.

# 3. Kapittul

**Kapittulin er um starvsfólk, ið er sett sum avloysari, ella í annað fyribilsstarv, í styttri tíð enn 3 mánaðir.**

## § 17. Barnsburður, ættleiðing og sjúka

Fyribilssett starvsfólk kemur undir barsilsskipanarlógina og dagpeningalógina.

## § 18. Aðrar setanartreytir

Fyri fyribilssett galda annars hesar ásetingar í kap. 2:

- § 3 um setanarbræv, er setanin longri enn ein mánað
- § 4, stk. 3 um lønarútgjalding
- § 11 um frítíð
- § 15 um samstarvsráð.

## § 19. Uppsøgn

Setanin hjá fyribilssettum kann enda frá einum degi til annan. Setanin er av við ongari fráboðan, tann dagin avtalað varð, tá ið starvsfólkið varð sett í starv. Setanin kann verða longd, og verður tá at roknað sum ikki slitin.

# 4. Kapittul

**Kapittulin er um arbeiðstíð og løn.**

## § 20. Arbeiðstíð

Arbeiðstíðin er 39,5 tímar um vikuna, íroknað ½ tíma matarsteðg um dagin. Matarsteðgurin verður lagdur í samráð við starvsfólkið, soleiðis at endamálið við matarsteðginum verður rokkið.

Stk. 2. Fulltíðarsett starvsfólk kann eftir umsókn fáa niðursett tímatal. Henda skipan kann vera tíðaravmarkað ella varandi.

*Stk. 3.* Ferðing í sambandi við tænastuferð verður roknað sum arbeiðstíð, tó hægst 13 tímar um døgnið, uttan so at annað er avtalað millum starvsfólk og arbeiðsgevara.

*Stk. 4.* Arbeiði á fremmanda tænastustaðnum telur við í arbeiðstíðini eftir vanligum reglum fyri uppgerð av arbeiðstíð.

## § 21. Løn o.a.

Lønin er grundløn og førleikaløn, sum ásett í lønartalvunum.

*Stk. 2.* Um so er, at ein arbeiðsgevari metir, at eitt starv hevur eina tílíka serstøðu, at tað ikki er umfatað av teimum vanligu fortreytunum fyri ásettu lønina, tekur arbeiðsgevarin málið upp við sítt aðalráð, sum sendir umsóknina víðari til Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum. Umsóknin um eina serflokking, viðbót ella onnur viðurskifti verða síðan viðgjørd av Fíggjarmálaráðnum og AKF.

*Stk. 3.* Metir stovnurin, at starvið krevur førleika á p.hd. stigi sambært førleikakrøvunum á Fróðskaparsetri Føroya, og starvsfólk er mett at hava henda førleika, fær viðkomandi ph.d. viðbót.

*Stk. 4.* Metir stovnurin, at starvið krevur førleika á professara stigi sambært førleikakrøvunum á Fróðskaparsetri Føroya, og starvsfólk er mett at hava henda førleika, fær viðkomandi professara viðbót.

*Stk.5.* Góðkendir sálarfrøðingar fáa autorisatiónsviðbót, tá ið starvið inniber útgreining og interventión sambært reglugerð um autorisatión hjá Dansk Psykolognævn.

*Stk. 6.* Lønin hjá starvsfólki við niðursettum tímatali verður lækkað samsvarandi.

*Viðmerking til § 21:*

*Í førum har ivi í sambandi við flokking er um innihaldið og støði av einari útlendskari útbúgving skipar Vegleingarstovan fyri, at meting verður fingin til vega frá Styrelsen for Forskning og Uddannelse. Umsóknir verða sendar til meting@uvs.fo.*

## § 22. Serflokking og viðbøtur

Ein arbeiðsgevari kann, tá ið umstøðurnar tala fyri tí, tilnevna eitt starvsfólk sum serfrøðing.

Mannagongdin er, at arbeiðsgevarin vendir sær til sítt aðalráð, sum síðan tekur avgerð um góðkenning av tilnevningini. Verður tað góðkent, kann arbeiðsgevarin fyri eitt ávíst tíðarskeið ikki longri enn 3 ár í senn, tilnevna starvsfólkið sum serfrøðing, og veita eina serfrøðingaviðbót upp til

markið sambært lønartalvuni um mánaðin. Verður umbønin ikki góðkend, grundgevur aðalráðið fyri tí.

Starvsfólkið skal hava minst 5 ára royndir frá viðkomandi starvi, ella samsvarandi eftirútbúgving/eykaútbúgving, og hava servitan á høgum fakligum stigi. Eisini er partur av metingini, um starvsfólkið antin hevur ávísan serligan førleika, sum starvið krevur, um starvið ber í sær ábyrgd út yvir tað vanliga, um starvsfólk í slíkum starvi er undir trýsti út yvir tað vanliga, ella um onnur serlig viðurskifti gera seg galdandi. Í tilnevningini skal verða útgreinað, hvat tað er, sum ger, at hetta starvsfólkið verður tilnevnt serfrøðingur. Serfrøðingar eru ikki fevndir av § 25 um yvirtíð.

*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin kann geva eina uppgávutengda, tíðaravmarkaða viðbót, tá ið støðan á arbeiðsplássinum er serlig og nakað eyka verður kravt av starvsfólkunum. Viðbótin skal minst verða 2.000 kr. og hægst 4.000 kr. um mánaðin, og tíðarskeiðið, ein kann fáa viðbót, skal hægst vera 9 mánaðir hvørja ferð. Arbeiðsgevarin skal kunna AKF og Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum, tá ið viðbót verður latin.

*Stk. 3.* Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum kann áleggja arbeiðsgevaranum at steðga viðbótum eftir stk. 1 og 2, tá ið mett verður, at treytirnar eru ikki loknar. Í tí føri verður viðbótin steðgað við rímiligari freist, og verður AKF kunnað í hvørjum einstøkum føri.

*Stk. 4.* Deildarstjórar, deildarleiðarar, ráðgevar, starvsfólk sum fáa aðrar viðbøtur (t.d. á Fróðskaparsetrinum og øðrum granskingarstovnum) kunnu ikki fáa viðbót sambært stk. 1 og 2. Starvsfólk, sum fáa viðbót eftir stk. 1, kunnu ikki fáa viðbót eftir stk. 2. Viðbøtur sambært stk. 1 og 2 eru ikki eftirlønargevandi.

*Stk. 5.* Metir arbeiðsgevarin ikki grundarlag longur er fyri viðbót sambært stk. 1, kann hendan verða steðgað, hóast avtalaða áramálið er ikki runnið, undir somu fyritreytum sum annars eru galdandi fyri uppsøgn av viðkomandi starvsfólki.

## § 23. Tímaløn

Tímalønin fyri hvønn arbeiðstíma verður roknað soleiðis:
ársløn/2080.

## § 24. Tímalønir á Fróðskaparsetrinum

Alt arbeiði, sum verður gjørt við støði í tímum, verður roknað út við grundarlagi í einum grundtímataksti.
Árligt arbeiðstímatal= 2080/1,26
Grundtímatakstur, G1=(ársløn á grundlønarstigi 9 og førleikaløn)/árligt arbeiðstímatal
Fyri venjingar, leiðbeining o.t.verður veitt 1,67 G1 fyri hvønn undirvísingartíma íroknað fyrireiking.
Fyri fyrilestrarundirvísing o.t. verður veitt 3 G1 fyri hvønn undirvísingartíma íroknað fyrireiking.
Fyri at leggja til rættis skeið o.t. er tímalønin grundtímataksturin, G1.

*Stk. 2.* Frá 1. juni 2017 verður grundtímasatsurin G1 roknaður av grundlønarstigi 8 og førleikaløn.

## § 25. Yvirtíðararbeiði

Verður drúgt yvirtíðararbeiði álagt starvsfólki, verður hetta samsýnt sum yvirtíðarløn, t.e. við einum tímalønarsatsi, ið er 140% av vanligu tímalønini hjá viðkomandi. Verður avspákað, verður tað í lutfallinum 1,4 tíma fyri hvønn yvirtíðartíma.

## § 26. Starvs- og lønaraldur

Lønaraldurin er vanliga tann sami sum kandidataldurin, t.e. áramálið, ið starvsfólk eftir prógtøku hevur verið í arbeiði, ið er treytað av teirri útbúgving, tað hevur.
*Stk. 2.* Starvsfólk er eitt ár á hvørjum stigi.
*Stk. 3.* Starvsfólk fær roknaðan fullan starvsaldur, hevur tað í minsta lagi hálvt starv. Er talan um minni enn hálvt starv, verður starvsaldurin roknaður lutfalsliga.
*Stk. 4.* Tá ið viðurskiftini tala fyri tí, kunnu sáttmálapartarnir gera avtalu um starvsaldur eftir øðrum reglum.
Stk. 5. Nemur starvsfólk sær hægri útbúgving, ið gevur rætt til umflokking, verður tað í nýggja lønarflokkinum sett á tað lønarstigið, sum í krónum liggur nærmast oman fyri verandi løn.

Verða starvsfólk úr øðrum sáttmálaøki flokkað í hesum sáttmálanum í sambandi við, at tey hava nomið sær akademiska útbúgving, verða tey somuleiðis innplaserað í viðkomandi lønarflokk á tað lønarstigið, sum í krónum liggur nærmast oman fyri verandi lønarstig. Í hesum sambandi telur ein leiðaraflokking í øðrum sáttmálaøkið ikki við, tá starvsfólk verður innplaserað í einum vanligum starvi.

Lønaraldur verður annars soleiðis, at starvsfólk, sum við fyrru innplaseringina hevði komið á eitt lønarstig, sum er javnt við ella hægri enn tað, tað kemur á í nýggju innplaseringini, fær frá hesum mundi nýggja aldursviðbót.

*Stk. 7.* Deildarleiðarar við deildarleiðaraviðbót 2 ella 3 verða løntir á endastigi. (Galdandi frá 1. juni 2017).

## § 27. Frí við ongari løn

Tá ið starvsfólk fær tænastufrí við ongari løn, verður gjørdur lønarfrádráttur.
a) Tá ið starvsfólkið er burtur heilar mánaðir, verða drignar heilar mánaðarlønir.
b) Tá ið starvsfólk er burtur vikur, dagar ella tímar, verður drigið fyri teir tímar, tey undir vanligum umstøðum høvdu verið til arbeiðis hetta tíðarskeiðið. Ein tími verður roknaður sum árslønin býtt við 2054. Við í árslønina verða roknað øll gjøld, sum verða goldin sum føst mánaðargjøld.

## § 28. Sjálvboðið eyka arbeiði

Eitt nú tá ið arbeiðspláss eru undirmannað í samband við sjúku ella feriu, og eitt nú tá ið serligar uppgávur, sum ikki hava skund, liggja og bíða, kunnu gerast avtalur um sjálvboðið eyka arbeiði. Avtalað verður ein føst tímaløn, og vikið verður frá øllum avtalum um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð o.a. Avtalaða tímalønin kann tó ongantíð vera hægri enn yvirtíðarlønin. Starvsfólkið og arbeiðsgevarin gera avtaluna, sum skal leggjast fyri álitisfólkið at góðkenna.

## § 29. Tænastuferðir

Dag- og tímapeningur á tænstuferð og útiviðbót er tað sama sum ásett í avtalu millum Felag Tænastumanna Landsins og Fíggjarmálaráðið.

## § 30. Førleikamenning

Sáttmálapartarnir hava gjørt avtalu um strategiska førleikamenning.

## § 31. Flytisamsýning

Noyðist starvsfólk av arbeiðsorsøkum at flyta í annan stað at búgva, verða flutningsútreiðslur av húski og húsbúnaði samsýnt tí eftir rokning.

# 5. Kapittul

## § 32. Seravtalur

Í sáttmálaskeiðnum skal vera møguligt at gera seravtalur millum Akademikarafelag Føroya (AKF) og Fíggjarmálaráðið.

## § 33. Gildiskoma og uppsøgn

Sáttmálin fær gildi frá 1. oktober 2022. Sáttmálin kann verða sagdur upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til at fara úr gildi tann 1.oktober 2025.

*Tórshavn 24. november 2023*

*Akademikarafelag Føroya* *Fíggjarmálaráðið*

*Páll Nólsøe, formaður* *Ruth Vang*

*landsstýriskvinna*

/

*Jan Mortensen*

*Lønarstjóri*

**Avtala um serstaka fríviku**

§ 1. Avtalan er galdandi fyri mánaðarlønt starvsfólk.

Stk. 2. Avtalan er eisini galdandi fyri tímalønt, sum eru í starvi í meiri enn 3 mánaðir.

Hvussu frívikan verður innvunnin og hildin

§ 2. Aftur at frítíðini eftir frítíðarlógini, vinnur starvsfólk eina sertaka fríviku um árið. Vunnir verða 0,42 serstakar frídagar við løn fyri hvønn mánað í starvi (5 daga vika). Serstøku frídagarnar verða vunnir samsvarandi setanarbrøkinum.

Stk. 2. Serstaka frívikan verður innvunnin og hildin í frítíðarárinum, á sama hátt sum frítíð eftir frítíðarlógini.

§ 3. Setanarmyndugleikin og tann setti avtala, nær í frítíðarárinum serstaka frívikan verður hildin. Hon verður løgd í samráð við starvsfólkið, tá ið arbeiðsgongdin loyvir tí. Starvsfólkið skal boða frá so tíðliga sum til ber, nær ætlanin er at halda frívikuna.

Stk. 2 Frídagarnir kunnu verða hildnir hvør sær, eisini sum hálvir dagar.

§ 4. Setanarmyndugleikin og starvsfólkið kunnu í staðin avtala, áðrenn frítíðarárið byrjar, at serstaka frívikan ella partur av henni verður ikki hildin, men útgoldin, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7. Er semja um tað, kann slík avtala eisini verða gjørd í frítíðarárinum.

§ 5. Setanarmyndugleikin og starvsfólkið kunnu eisini avtala, at serstaka frívikan ella partur av henni, sum er ikki hildin, tá ið frítíðarárið er av, verður flutt at halda í seinri frítíðarári.

Stk. 2. Avtalan skal vera skrivlig og avtalað skal eisini verða, nær fluttu dagarnir skulu verða hildnir.

Stk. 3. Verður avtala ikki gjørd sambært stk. 1, verða serstøku frídagarnir útgoldnir, tá ið frítíðarárið er av, jb. § 7.

§ 6. Fer starvsfólk úr starvi, og hevur ikki hildið serligu frívikuna ella part av henni, verður hon útgoldin, jb. §7.

§ 7. Útgjaldið fyri serstakan frídag er ½% av vunnari løn í undanfarna innvinningarári.

Í útrokningini verður ikki tald við løn, sum er útgoldin í frítíðini, veitt frítíðarløn ella útgoldið frítíðarískoyti.

**Gildiskoma og skiftisreglur**

§ 8. Avtalan hevur gildi frá 1. oktober 2003.

§ 9. Starvsfólk, sum er í starvi alt innvinningarárið 2003/2004, tvs. frá 1. apríl 2003 til 31. mars 2004, hevur rætt til 5 serstakar frídagar í frítíðarárinum, sum byrjar 2. mai 2004. Hevur starvsfólkið verið í starvi minni enn alt innvinningarárið, verða serligu frídagarnir lækkaðir samsvarandi.

§ 10. Sáttmálafrídagarnir fella burtur 1. januar 2004.

**Avtala um strategiska og skipaða førleikamenning á stovnum landsins**

**§ 1. Inngangur**

Skulu uppgávurnar hjá stovnum landsins verða røktar á munadyggan hátt við neyðugari dygd og framhaldandi menning, er sera týðandi, at førleikarnir hjá starvsfólkunum verða áhaldandi røktir og mentir.

*Stk. 2*. Partarnir halda tað vera avgerandi, at starvsfólk hjá landinum fáa møguleika at menna sín førleika, bæði í dagliga arbeiðnum og við eftirútbúgving og víðari útbúging. Fyri at fremja førleikamenningina eiga leiðslur og starvsfólk í felag at hava sum mál at stovna felags læruumhvørvi og at leggja til rættis eina smidliga tilgongd fyri førleikamenningini. Partarnir eru samdir um, at strategisk mál fyri menningini skulu verða gjørd fyri øll starvsfólk.

**§ 2. Øki**

Avtalan er galdandi fyri starvsfólk, sum eru fevnd av sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og felag, ið hevur undirskrivað hesa avtalu.

**§ 3. Endamál**

Endamálið við avtaluni er at binda leiðslu og starvsfólk til at leggja stóran dent á førleikamenningina, og báðir partar hava ábyrgd av at tryggja, at førleikamenningin styrkist. Hetta skal nøkta tørvin á fakligari menning hjá einstaka stovninum og einstaka starvsfólkinum.

**§ 4. Menningarmál**

Fyri hvørt einstakt starvsfólk á øllum stovnum hjá landinum verður gjørd ein skipað førleikamenningarætlan, ið skal taka atlit at málunum hjá tí einstaka stovninum.

*Stk. 2.* Árliga er samrøða millum leiðsluna og starvsfólkið, har ítøkilig menningarmál fyri einstaka starvsfólkið verða fest á blað í semju við starvsfólkið. Í starvsfólkasamrøðuni verður eisini viðgjørt um og hvussu, starvsfólkið hevur nátt málunum, ið sett vórðu í síðstu starvsfólkasamrøðu.

*Stk 3.* Útbúgving og annað menningarvirksemi fer vanliga fram í arbeiðstíðini. Arbeiðsgevarin rindar, jb. stk. 2, útreiðslur av útbúgving.

*Stk. 4.* Leiðsla og starvsfólk hava felags ábyrgd av, at menningarmálini verða rokkin. Leiðslan tryggjar karmar og treytir fyri førleikamenning, og starvsfólkið arbeiðir fram móti avtalaðu menningarmálunum.

**§ 5. Almennur førleiki**

Dagførdur grundleggjandi skúlakunnleiki kann verða treytin fyri at røkja og menna fakliga førleikan. Bæði einstaki stovnurin og einstaka starvsfólkið hava ábyrgd av at virka fyri, at almennur førleiki er partur av førleikamenningini.

**§ 6. Leiklutur hjá leiðslu, starvsfólki og samstarvsnevnd**

Leiðsla og starvsfólk skulu í felag, grundað á strategisku málini hjá stovninum og tørvinum á strategiskari førleikamenning

áseta grundreglur og leiðreglur fyri førleikamenningartiltøkunum á stovninum

samráðast um grundreglurnar fyri og tørvin á eftirútbúgving fyri allar starvsfólkabólkar

áseta leiðreglur fyri, hvussu starvsfólkasamrøður skulu verða skipaðar

*Stk. 2.* Leiðsla og starvsfólk eftirmeta í felag eina ferð árliga førleikamenningartiltøkini á stovninum.

*Stk. 3.* Uppgávurnar í stk. 1 og 2 røkir samstarvsnevndin, um stovnurin hevur eina slíka. Biður annar parturin um tað, verður ein menningarnevnd vald undir samstarvsnevndini.

**§ 7. Fylgibólkur**

Ein fylgibólkur verður settur við umboðum fyri Fíggjarmálaráðið og tey feløg, sum hava undirskrivað hesa avtalu.

**§ 8. At seta í gildi og siga upp**

Henda avtala verður sett í gildi tann 1. oktober 2003. Avtalan kann skrivliga verða søgd upp við 3 mánaða ávaring til ein 1. í mánaðinum, tó í fyrsta lagi tann 1. oktober 2005.

**Samráðingarnar 2005** **Fylgiskjal**

Í sáttmálanum í 2003 gjørdu Fíggjarmálaráðið og feløgini avtalu um strategiska og skipaða førleikamenning.

Partarnir taka stig til í hesum sáttmálaskeiðnum at fáa avtaluna at virka.

## Avtalan

Í avtaluni um strategiska og skipaða førleikamenning stendur, at á einstaka stovninum:

- skulu verða gjørd strategisk mál fyri menning fyri øll starvsfólk
- skal fyri hvørt einstakt starvsfólk vera ein skipað førleikamenningarætlan
- er árliga samrøða millum leiðslu og starvsfólkið um ítøkilig menningarmál
- verða ásettar grundreglur og leiðreglur fyri førleikamenningartiltøk
- verða ásettar leiðreglur fyri, hvussu starvsfólkasamrøður skulu verða skipaðar
- skulu leiðsla og starvsfólk í felag eftirmeta eina ferð um árið førleikamenningartiltøkini á stovninum.

## Mál og strategiska ætlan

Nakrar av fortreytunum fyri, at avtalan skal virka á einstaka stovninum, er at leiðsla og starvsfólk vita, hvør uppgávan hjá stovninum er, at stovnurin hevur greið mál og strategiska ætlan fyri, hvussu málini verða rokkin. Tað merkir eisini, at øll á stovninum skulu vita, hvørji málini eru. Alneyðugt er, at leiðsla og starvsfólk samskifta fyri at tryggja, at greitt er, hvørji málini eru og at tryggja, at tey verða rokkin.

Í avtaluni hevur samstarvsnevndin meginleiklutin, tá ið talan er um grundreglur og leiðreglur fyri førleikamenningartiltøkunum og starvsfólkasamrøðum.

Er ongin samstarvsnevnd sett á einum stovni, kann samskifti verða skipað á annan hátt. Tað kann t.d. vera í eini menningarnevnd í staðin. Nevndin verður samansett soleiðis, at tryggjað verður, at umboðanin verður so breið, at leiðsla og starvsfólk hava eins stóra umboðan, at samskiftið er mennandi og at øll kunnu og tora at koma til orðanna.

Summir stovnar eru so mikið lítlir, at best er kanska, at øll í felag samskifta og eingin serstøk nevnd verður sett.

Fyri at avtalan skal virka til fulnar, mugu øll á stovninum vera við.

## Strategiska førleikamenningin

Tá ið greitt er, hvørji strategisku málini hjá stovninum eru, ber til at lýsa tørvin á strategiskari førleikamenning hjá stovninum.

Greiða má fáast á, hvør førleiki er til staðar og eftir tí, hvør førleiki manglar. Ein spurningur kann eisini vera, um almennur førleiki er, sum skal verða fingin til vega.

Førleikamenning kann vera at hava skiftisskipan við onkran annan stovn, at hava skipan, sum tryggjar síðumansupplæring og at fólk við líkum uppgávum, frá ymiskum stovnum, hittast at samskifta um og viðgera arbeiðsuppgávur og á tann hátt læra hvør av øðrum.

**Kanning**

Tilfar er ikki til taks, sum til ber at grunda tiltøk og broytingar á. Partarnir eru tí samdir um eftir nýggjár at kanna, hvussu gongur við strategisku og skipaðu førleikamenningini. Tilfar skal verða brúkt til at fáa innlit í, hvørji amboð eru neyðug og at fáa skipaðu og strategisku førleikamenningina at virka betur.

**Avtala um tiltøk, ið kunnu stuðla undir ein virknan starvsfólkapolitikk**
**á landsins stovnum.**

**1. Inngangur**

Tað er týdningarmikið, at starvsfólkið hevur møguleika fyri persónligari menning, og neyðugt er samstundis at taka atlit at sambandið millum arbeiðslív og onnur lívsviðurskifti. Partarnir eru tí samdir um, at styrkja teir møguleikar, ið stovnarnir hava, tá ið teir evna sín starvsfólkapolitikk á hesum økjum:

- Førleikamenning
- Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovnum
- Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum
- Javnstøða

Harafturat eiga rættindi hjá starvsfólkum at verða vird, verður virksemi hjá landinum lagt til onnur at reka.

**2. Førleikamenning**

Leiðslur og starvsfólk eru týdningarmesta tilfeingið hjá landsins stovnum. Tað er tað arbeiði, sum tey í landsins tænastu inna, sum ger av, um úrslitini verða góð. Framhaldandi at menna starvsfólkini er tí umráðandi fyritreyt fyri, at landsins stovnar mennast.

Partarnir eru tí samdir um, at:

- miðvís og dagførd eftir- og víðariútbúgving av starvsfólkinum er ein fyritreyt fyri virkisfýsnum almennum stovnum við høgum tænastustigi.

· hvør stovnur sær skal virka fyri, at starvsfólkinum stendur í boði at kunna menna sín førleika bæði gjøgnum sítt dagliga yrki og við eftir- og víðariútbúgving. Til tess at røkka hesum endamáli, eigur hvør stovnur at seta sær miðvís menningarmál.

· endamálið við hesi avtalu er at geva starvsfólkinum umstøður at menna seg sjálvt og síðani møguleikar, at átaka sær virknari leiklut at mynda virki stovnsins. Harumframt ber til hjá leiðsluni at menna almenna tænastuførleikan.

· starvsfólk og leiðsla hava í felag ábyrgdina av førleikamenningini. Uppgávan hjá stovninum er at bera so í bandi, at starvsfólkini altíð eru skikkað til uppgávuna.

· Sáttmálapartarnir seta ein arbeiðsbólk, sum í sáttmálaskeiðnum skal tilevna eina vegleiðing um eina skipaða útbúgvingarætlan til starvsfólk á landsins stovnum.

**3. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir eldrapolitikk á landsins stovnum**

Fyri at varðveita eldri starvsfólk og fakligu vitan teirra á arbeiðsmarknaðinum, eru partarnir samdir um, at sum liður í eldrapolitikkinum á einstaka stovninum eigur at bera til at gera skipanir til starvsfólk, sum eru 60 ár og eldri – um so er, at tey sjálvi vilja tað, og umstøðurnar á arbeiðsplássinum annars eru til tess – at leggja síni eldru ár á arbeiðsmarknaðinum soleiðis til rættis, at tey fáa eina liðiliga tillagingarskipan, áðrenn tey fara úr starvi.

Tá ið stovnar evna sín eldrapolitikk, kunnu teir sum part í hesum gera sjálvbodnar skipanir, í hesum karmi:

***Niðursett tíð***

Hesar treytir skulu verða loknar, so at starvsfólk skal kunna koma undir skipanina:

a) vera fylt 60 ár

b) hava starvast hjá landinum seinastu 10 árini

c) arbeiðstíðin skal vera minst 20 tímar um vikuna, eftir tað, at hon er niðursett

Starvsfólk kann fara uppí ¼ niður í starvstíð við lutfalsliga at fara niður í løn.

Stovnurin kann í hesum tíðarskeiðinum gjalda eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin var ikki sett niður.

***Niðursett tíð orsakað av sparingum***

Gera sparingar, at starvsfólk verður sett niður í tíð, varðveitir starvsfólkið eftirlønargjaldið, sum um starvstíðin varð ikki sett niður. Treytirnar eru:

a. starvsfólkið hevur fylt 55 ár

b. starvsfólkið hevur starvast hjá landinum seinastu 10 árini

c. arbeiðstíðin er minst ½ tíð, eftir at hon er niðursett.

*Lægri starv*

Stovnur kann eftir umsókn játta starvsfólki, ið hevur fylt 55 ár, at fara í annað lægri starv, um so er, at starvsfólkið seinastu 10 árini hevur starvast fulla tíð hjá landinum í einum starvi við leiðsluábyrgd ella í øðrum serliga krevjandi starvi.

Lønin verður tá samsvarandi lægra starvinum, men starvsfólkið fær framvegis heilt ella lutvíst eftirlønargjaldið í hægra starvinum, fyri eitt tíðarskeið, sum í mesta lagi má vera 7 ár.

Stovnurin kann veita eitt ikki eftirlønargevandi ískoyti, sum í mesta lagi kann vera munurin millum lønina í lægra flokkinum og lønina í hægra flokkinum. Ískoytið kann í mesta lagi verða veitt í 3 ár.

**4. Tiltøk, sum kunnu stuðla undir familjupolitikk á landsins stovnum**

Tá ið lagt verður til rættis, eiga bæði starvsfólk og leiðsla at vísa lagaligheit og smidleika, fyri at betri samanhangur kann verða millum familjulív og arbeiðslív.

Í teimum førum, tá ið børn verða innløgd á sjúkrahús, og lækni sigur tað vera neyðugt, at annað av foreldrunum verður innlagt við, kann starvsfólkið, loyva arbeiðsumstøðurnar tí, brúka dagarar, ið starvsfólkið eigur til frí við løn, tá ið barn/børn teirra eru sjúk, samanhangandi longur enn 2 dagar.

**5. Javnstøða**

Lønarskipanin eigur at verða so mikið greið, at hon gevur betri trygd fyri, at javnstøða er millum kynini, tá ið lønin verður ásett.

**6. Umleggja alment virksemi**

Um so er, at virksemi hjá landinum verður yvirtikið av øðrum at reka, eiga tær avtalur, rættindi og skyldur, landið hevur mótvegis starvsfólkunum, tá ið umskipanin fer fram, óskerdar at verða førdar yvir á tann, sum yvirtekur virksemið.

## Avtala um veterinera tilbúgvingarskipan á Heilsufrøðiligu starvsstovuni

*1. Endamál*

Avtalan skal tryggja, at Heilsufrøðiliga starvsstovan kann tryggja nøktandi tilbúgving á veterinera økinum uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

Avtalan umfatar teir limir, ið eru partar av veterineru tilbúgvingini á Heilsufrøðiligu starvsstovuni.

*2. Skilmarkingar*

Grundleggjandi verður veterinera tilbúgvingarkipanin skipað við tilkallivakt og ráðgeving.

*Tilkallivakt*

Djóralækni kann hava tilkallivakt uttan fyri vanliga arbeiðstíð. Vakthavandi skal altíð vera tøkur við fartelefon. Vakthavandi skal kunna fara frá húsum innan fyri 2 tímar ( responstíð= 2 tímar).

Tilkallivaktin er samanhangandi minst 8 tímar hvørja ferðina.

*Ráðgeving*

Eingin beinleiðis bakvakt er, men tilkallivaktin kann ringja til starvsfelaga við viðkomandi førleika at søkja sær ráðgeving. Starvsfelagar hava tó ikki skyldu at taka telefonina, tá ið tilkallivaktin ringir.

*3. Uppgávur*

Tilkallivaktin skal, so skjótt sum til ber, fremja tær atgerðir og uppgávur, sum ikki tola at bíða til næsta arbeiðsdag. Uppgávurnar verða nærri skilmarkaðar í innanhýsis avtalum. Virksemið í vaktini skal skipast og skjalfestast sambært frammanundan avtalaðum innanhýsis mannagongdum. Dentur skal leggjast á, at so nógvar uppgávur sum møguligt verða framdar í vanligari arbeiðstíð.

*4. Vaktarplanur*

Heilsufrøðilga starvsstovan ger, í samráð við luttakararnar í veterineru vaktarskipanini, ein vaktarplan fyri í minsta lagi ein mánað í senn. Meginreglan er, at starvsfólk skulu hava fráboðan um vaktargongu við 3 vikur freist. Meginreglan er somuleiðis, at eingin einstakur persónur skal knógva undir vaktarbyrðu samfelt longur enn 14 dagar á hvørjum sinni, og, alt tað ið til ber, skal síðani verða frítikin fyri vaktargongu eins leingi. Verða vaktarboð givin við styttri enn 48 tíma freist, hækkar vaktarpeningurin við 25% fyri álagda vaktarskeiðið.

*5. Samsýning*

Fyri at vera tøkur, fær tilkallivaktin rindaðan vaktarpening, sum er 12,25% av tímalønini hjá viðkomandi. Tímalønin (ársløn/2080) verður roknað av grundlønini, t.e. ikki av viðbótum.

Tá ið tilkallivaktin arbeiðir í vaktini, verður hetta samsýnt við 150% av vanligu tímalønini hjá viðkomandi. Samsýningin verður rindað fyri hvønn byrjaðan ½ tíma. Arbeiðstíðin telur frá tí, at djóralæknin fer heimanífrá.

Ráðgevingin: Tann, sum svarar fakliga spurninginum, fær rindaða samsýning, sum er 300% av tímalønini hjá viðkomandi. Tímalønin (ársløn/2080) verður roknað av grundlønini, t.e. ikki av viðbótum.

*6. Aðrar vaktarskipanir*

Gerst tørvur á vaktarskipan á øðrum stovnum enn HFS, ella fyri aðrar starvsbólkar í sáttmálaøkinum, verður henda avtala eisini at galda í teimum førunum, og tá við somu treytum og somu samsýningum.

Vil arbeiðsgevari hava eina styttri responstíð enn 2 tímar, skulu sáttmálapartarnir samráðast um hettar.

*Á Argjum tann 6.mai i 2011*

**Akademikarafelag Føroya** **Fíggjarmálaráðið**

## Avtala um løntar Ph.D lesandi

### § 1. Øki

Treyt fyri at verða settur eftir hesi avtaluni er

* útbúgving á kandidatstigi
* innskriving sum ph.d.-lesandi á hægri útbúgvingarstovni í Føroyum og
* at ph.d.-stig ikki er tikið frammanundan.

**Viðm.** Avtalan er bert fyri PhD lesandi, og ávirkar ikki setanartreytirnar hjá starvsfólkum í føstum starvi, ið fara undir PhD lestur sum part av teirra vanliga starvi (t.d. sum vísindastarvsfólk ella adjunktar).

*Stk. 2.* Avtalan er ikki fyri tey, sum sambært § 1, stk. 2 í sáttmálanum ikki koma undir sáttmálan millum Akademikarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

### § 2. Setan

Ph.d-stipendiat verður vanliga lýst leyst.

Setanartíðin er í mesta lagi 3 ár, tá ið lesturin er lagdur til rættis sum fulltíðarlestur (jb. tó stk. 2). Setanartíðin kann tó ikki verða longri enn tann tíðin, tann lesandi er innskrivaður sum ph.d.-lesandi.

*Stk. 2.* Er tann lesandi burtur fyri barnsburð kann setanartíðin eftir umsókn verða longd líka leingi, sum fráveran er, tó í mesta tað tíðarskeið viðkomandi hevur rætt til fráveru sambært barsilslógini. Setanartíðin kann somuleiðis verða longd undir drúgvari sjúku, kann verða víst á, at tað hevur seinkað lesturin.

*Stk. 3.* Tann ph.d-lesandi fær setanarskriv, soleiðis sum ásett í § 3 í sáttmálanum Akademikarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

### § 3. Løn

Lønin er stig 1 í lønartalvuni galdandi fyri kandidatar løntir sambært sáttmálanum millum Akademikarafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

*Stk. 2.* Lønin verður goldin mánaðarliga afturút.

Stk. 3. PhD-lestur telur við, tá ið starvsaldur verður ásettur, tó í mesta lagi trý ár.

**§ 4. Barnferð**

Ásetingarnar í § 7 um barnferð í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og AKF eru galdandi.

**§ 5. Eftirløn**

Eftirlønargjaldið er 16% av lønini, sum er ásett í § 3.

*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin rindar eftirlønargjaldið eftir treytunum, sum ásettar eru í sáttmálanum.

**§ 6. Arbeiðsskylda**

Ph.d-lesandi hava skyldu at veita tað lestraravrik, sum ásett er í lestrarætlanini, jb. kunngerðina um ph.d., her uppi í eisini tær ferðir, sum neyðugar eru.

*Stk. 2.* Ph.d-lesandi hava skyldu at loysa arbeiðsuppgávur fyri setanarstovnin, eftir ásetingum hjá stovninum, í einum vavi, sum í setan í 3 ár samanlagt er 910 arbeiðstímar.

*Stk. 3.* Verður farið út um teir 910 tímarnar, sum ásett í stk. 2, verður tað lønt við eini tímaløn, sum er 1/2080 av lønini, sum ásett er í § 3.

**§ 7. Frítíð**

Frítíð verður veitt eftir frítíðarlógini.

**§ 8. Serstaka frívikan**

Avtalan um serstøku frívikuna er galdandi fyri PhD-lesandi.

**§ 9. Sjúka**

Ph.d.-lesandi fáa løn undir sjúku, eisini frávera tá ið tann setti hevur fingið skaða í tænastuni.

**§ 10. Orlov o.a.**

Setanarmyndugleikin kann, eftir ásetingunum í sáttmálanum, geva tí setta fult ella partvíst frí, tá ið børnini eru sjúk.

*Stk. 2.* Tann lesandi kann fáa orlov við ongari løn, er tað semja millum tann lesandi, útbúgvingarstovnin og setanarmyndugleikan.

**§ 11. Eftirsitiløn**

Ásetingarnar í § 9 um eftirsitiløn í sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og AKF eru galdandi.

**§ 12. Flytisamsýning og tænastuferðir**

Ph.d.-lesandi eru ikki fevnd av ásetingunum í sáttmálanum um endurgjald fyri útreiðslur í samband við tænastuferðir, ella ásetingarnar um flytisamsýning.

*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin kann tó í samband við ítøkiligar ferðir og uttanlandavitjanir rinda útreiðslur í hesum sambandi, tó ongantíð meira enn sambært avtaluni um tænastuferðir millum Tænastumannafelag Landsins og Fíggjarmálaráðið.

**§ 13. Setanin av**

Tá ið setanarskeiðið er av, er setanin av við ongari fráboðan.

*Stk. 2.* Fyri setanarviðurskiftini galda annars ásetingarnar í starvsmannalógini.

**§ 14. Gildiskoma og uppsøgn**

Avtalan er í gildi frá 1. januar 2013. Avtalan kann verða søgd upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til at fara úr gildi 1. oktober 2015.

**Á Argjum tann 25. februar 2013**

**Akademikarafelag Føroya** **Fíggjarmálaráðið**

## Vegleiðing um deildarleiðara- og verkætlanarleiðaraviðbøtur

### Deildarleiðaraviðbøtur

Tá deildarleiðarastørv skulu flokkast, skal heildarmeting gerast, ið tekur støði í niðan fyri nevndu viðurskiftum.

*Innihaldið og ábyrgdarstigið í starvinum*
Hvar í bygnaðinum er deildarleiðarastarvið og á hvørjum ábyrgdarstigi er leiðarastarvið.

*Ábyrgdarøkið*
Mett eigur at verða um, hvussu komplekst og tungt fakliga ábyrgdarøkið er, og hvussu útsett starvið er umframt hvussu stórt er trýstið.

*Vavið og slagið av arbeiðsleiðslu*
Fyri at verða settur sum deildarleiðari, skal starvið innibera veruliga starvsfólkaábyrgd.

Metingin eigur at taka støði í, hvussu nógv starvsfólk hava tilvísing til leiðaran, fakliga bakstøðið hjá starvsfólkunum umframt fakligu ábyrgdina hjá starvsfólkunum. Ein deildarleiðari 1 hevur vanliga 1-3 starvsfólk, meðan deildarleiðari 2 hevur 4 til 10-12 starvsfólk. Tá leiðari verður flokkaður sum deildarleiðari 3, er talan um heilt stórar deildir, ið hava eina tunga fakliga ábyrgd.

Talan er um eina heildarmeting, har hugt verður eftir øllum kriterium. Tí kann eitt fakliga tungt ábyrgdarøkið við bert 3 starvsfólkum í einstøkum førum útloysa eina hægri deildarleiðaraviðbót, meðan ein deild við 12 starvsfólkum ella meira eisini kann útloysa eina lægri deildarleiðaraviðbót, um fakliga ábyrgdarøkið v.m. ikki verður mett nóg tyngjandi.

*Hvussu líknandi størv eru flokkað*
Ein samanbering tvørtur um stovnar eigur at verða gjørd í sambandi við nýggjar flokkingar.

Deildarleiðara 1 viðbótin verður í heilt serstøkum førum eisini latin í sambandi við størv, har talan er um serliga tyngjandi fakliga ábyrgd uttan, at talan er um beinleiðis starvsfólkaábyrgd. Talan kann her vera um fakligar leiðarar, ið hava fakliga ábyrgd av einum størri fakligum økið.

### Verkætlanarleiðaraviðbót

Í einstøkum føri kann viðbót svarandi til deildarleiðara 1 gevast verkætlanarleiðarum av stórum verkætlanum. Í heilt serligum førum kann viðbót latast sambært § 21 stk. 2.

Tá viðbót fyri verkætlanarleiðslu skal gevast, skal talan vera um stórar verkætlanir, sum í vavi kunnu samanberast við at hava ábyrgd av eini størri deild (starvsfólk, fíggjarlig- og umsitingarlig ábyrgd). Talan skal vera um verkætlanir, sum krevja serligar førleikar innan verkætlanarleiðslu, og sum viðføra stóra ábyrgd m.a. fíggjarliga. Ætlanin við viðbótini er sostatt ikki, at hon verður latin starvsfólkum, sum (leypandi) hava ábyrgdina av verkætlanum sum ein natúrligur partur av starvinum.

### Samanlegging av viðbótum

Viðbøtur kunnu ikki verða lagdar saman. Tó kann phd-, professara- og autorisatiónsviðbót verða løgd saman við deildarleiðaraviðbót.